# Stendur í botni

**Útlitini til, at endi fæst á verkfallinum hjá Føroya Pedagogfelag, eru ikki góð. Semingsfólkini hava roynt at fingið partarnar til samráðingarborðið aftur, uttan at hetta er eydnast**

VERKFALLIÐ
*Turið Kjølbro*

Hóast royndir frá semingsfólkunum at fáa Føroya Pedagogfelag øðrumegin og Fíggjarmálastýrið og kommunalu arbeiðsgevarafeløgini hinumegin at taka samráðingarnar uppaftur, og at báðir partar siga seg vera til reiðar at sessast aftur við borðið, kunnu vit staðfesta, at langt er ímillum partarnar.

Frá samráðingarleiðarunum hjá kommununum og Fíggjarmálastýrinum, Tummasi Magnussen, hevur Føroya Pedagogfelag fingið at vita, at tænastumenninir í Føroya Pedagogfelag ikki kunnu vera í somu lønartalvu sum hinir limirnir hjá felagnum.

- Vit hava fingið fleiri ymiskar grundgevingar fyri, hví hetta ikki skal lata seg gera, men ein sakførari, vit hava sett okkum í samband við, sigur hinvegin, at hvørki løgfrøði ella teknikkur forða fyri, at tænastumenninir kunnu koma í somu lønartalvu, greiðir Carita Björklund.

## Eingi undantøk

Undan semingini fyri trimum vikum síðani, skrivaði Føroya Pedagogfelag øðrumegin og Fíggjarmálastýrið, Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið undir avtalu, sum segði, at arbeiðast skuldi fram ímóti eini lønartalvu fyri allar limirnar í Føroya Pedagogfelag. Í avtaluni vóru eingi undantøk tikin fyri tænastumenninar í Føroya Pedagogfelag.

- Grundarlagið varð lagt soleiðis, at allir okkara limir kunnu leggjast inn í eina lønartalvu. Nú arbeiðið hjá okkum er liðugt, fáa vit at vita frá mótpartinum, at tænastumenninir kunnu ikki vera í somu lønartalvu. Hesin spurningurin hevur aldri verið viðgjørdur, hóast Tummas Magnussen hevur tikið fyrivarni fyri tænastumonnunum út frá tí sjónarmiði, at um lønarhækkingin til teirra verður ov stór, at hon fer upp um avtalaða karmin. At tænastumenninir ikki kundu koma í lønartalvuna, hevur ongantíð verið nevnt, sigur Carita Björklund.

Føroya Pedagogfelag heldur fast við, at allir teirra limir skulu í eina lønartalvu.

- Vit halda fast við gjørda avtalu, sum er undirskrivað av øllum pørtum. Tað ber ikki til at arbeiða á hendan hátt, fyrst at skjóta seg inn undir tey 12 prosentini, sum mótpartinum segði, at vit fóru upp um, og nú tænastumenninar, sum ongantíð hevur verið viðgjørt. Vit hava tí einki álit á mótpartinum. Fyri okkum sær tað út sum illvilji ímóti okkum, sigur Carita Björklund.

## Umhugsa tiltøk

Verkfallið hevur vart í eina góða viku nú. Spurd um, hvat skal til, fyri at Føroya Pedagogfelag kemur aftur til samráðingarborðið, sigur Carita Björklund.

- Vit hava brúk fyri eini ógvuliga góðari grundgeving fyri, at tað ikki ber til at tænastumenninir eru umfataðir av somu lønartalvu sum hinir limirnir. Vísir tað seg soleiðis, at tað ikki ber til, er tað sera harmiligt, at hetta ikki er komið fram fyrr enn nú.

Í gjár varð fundur millum nevndina í Føroya Pedagogfelag og álitisfólkini í felagnum. Eitt mál á skránni var, hvussu tiltøkini í verkfallinum kunnu herðast.

- Tað kann hugsast, at vit taka undantøkini aftur, sum eru givin, sigur Carita Björklund, og sipar til undantøkini, sum eru givin Føroya Barnaheimi, Rókini og øðrum serstovnum, har fólk hava sítt heim.




*Samráðingarleiðararnir, Carita Björklund og Tummas Magnussen.*

## Tænastumenninir uttanfyri

Samráðingarleiðarin hjá mótpartinum, Tummas Magnussen, vísir aftur tí, sum forkvinna í Føroya Pedagogfelag sigur.

- Tænastumenninir hava aldri verið ein partur av samráðingunum og tí sigur avtalan einki um teir. Áðrenn vit fóru undir semingina, gjørdu vit Pedagogfelagið vart við, at tænastumenninir ikki verða fevndir av lønartalvuni. Saman við lønartalvuni hjá tænastumonnunum er ein eftirlønarskipan, og spurningurin er, hvussu eftirlønin hjá teimum skal útroknast, um lønartalvan hjá teimum verður burtur. Tí eru teir uttanfyri eina lønartalvu, sigur Tummas Magnussen.

At gera eina lønartalvu fyri allar limirnar í Føroya Pedagogfelag, var ikki eitt av upprunakrøvunum hjá Føroya Pedagogfelag. Tað kom ikki fyrr enn partarnir fóru til seming. Tummas Magnussen heldur, at hesin spurningin aldri átti at verið komin uppí samráðingarnar.

- At gera eina lønartalvu er ógvuliga fløkt og umfatandi, og vit søgdu tí beinanvegin, at hetta átti ikki at verða gjørt undir samráðingunum. Tað er als ikki vist, at vit nakrantíð verða samd um eina lønartalvu. Vit skutu tí upp fyri Pedagogfelagnum, at teirra limir fáa somu lønarhækking sum onnur hava fingið, og síðani kunnu vit taka spurningin upp viðvíkjandi lønartalvuni. Men hesum hava tey avvíst.

Tummas Magnussen vísir eisini aftur, at tey hava illvilja ímóti Pedagogfelagnum.

- Hatta er tað reina tvætl. Vit hava alla tíðina víst ein erligan vilja at samráðast.

Hann undrast yvir, at Føroya Pedagogfelag leggur so hart út í verkfallinum við at skerja serstovnar so nógv.

- Alt skal valdast. Tað hevur ikki verið siðvenja, at verkfall skal ganga út yvir heilsuna hjá einstøkum, sigur Tummas Magnussen, sum einki boð uppá, nær hetta verkfallið verður av.

# Sosialurin skrivar tíðindi á www.portal.fo

**Føroya Tele og Sosialurin hava gjørt samstarvsavtalu um, at Sosialurin í framtíðini fer at leggja út tíðindi á heimasíðuna hjá Føroya Tele, www.portal.fo**

TÍÐINDI Á INTERNETINUM
*Eirikur Lindenskov*

Frá í dag at rokna er tað Sosilaurin sum fer at leggja út tíðindi á heimasíðuna hjá Føroya Tele, www.portal.fo, sum síðani 1999 hevur virkað sum tíðindamiðil á internetinum.

Føroya Tele hevur higartil havt tíðindafólk í starvi, men við nýggju avtaluni, verða tað fólk hjá Sosialinum, sum fara at standa fyri hesum arbeiði.

Internetið hevur sum tíðindamiðil vunnið nógv fram seinastu árini, og er tað vorðið alt meira vanligt, at telefeløg o. o. hava sínar egnar miðlar, ella portalar, sum tað verður nevnt. Síðani september 1997 hevur Sosialurin havt sína egnu heimasíðu, InternetSosialin, og verða ongar broytingar tí viðvíkjandi.

Á www.portal.fo verða tíðindi fyrst og fremst løgd út í arbeiðstíð gerandisdagar. Seinni verður skipanin útbygd við meira tilfari. Dentur verður lagdur á føroysk tíðindi, men ein partur fer eisini at fevna um útlendskt tilfar.

Samstundis sum Sosialurin tekur yvir tíðindapartin á www.portal.fo, fer Sosialurin eisini at leggja ítróttartíðindi út á www.sportal.fo, sum Føroya Tele nú eisini eigur.

Enn sum áður verður tíðindatænastan hjá Føroya Tele ein ókeypis tænasta.


## TØKK



Ein hjartans tøkk til tykkum ið stuðlaðu Sjálvstýrisflokkinum og mær persónliga á fólkatingsvalinum.

**Eyðun Elttør**
**Sjálvstýrisflokkurin**


# Nýggj skaldsøga og nýtt søgusavn

**Tá ið eg havi málað summarhúsið og Pílagrímar eru heitini á nýggjastu útgávunum hjá Mentunargrunni Studentafelagsins**

ÚTGÁVUR
*Turið Kjølbro*

Mentunargrunnur Studentafelagsins hevur givið út eina skaldsøgu og eitt stuttsøgusavn. Talan er um skaldsøguna Tá ið eg havi málað summarhúsið eftir Oddvør Johansen og stuttsøgusavnið Pílagrímar eftir Hanus Kamban.







Søgugongdin í skaldsøguni fer fram í Havnini í 90-unum. Tann hálvvaksni Pedda hevur ilt við at fóta sær, og vanlukku blandingurin av samfelagskreppu og rúsevnum ger tað ikki lættari. Men tað er altíð vón fyri framman.

Hanus Kamban gjørdi í áttatiárunum hol í sjógv í føroyskari stuttsøguskriving við trimum søvnum. Nú ger høvundurin aftur vart við seg í níggju viðkomandi og spennandi søgum undir heitinum Pílagrímar. Í vikuskiftisinnlegginum í Sosialinum fyri viku síðani ummældi Andrias Justesen savnið.

Tá ið eg havi málað summarhúsið er 116 blaðsíður og kostar 220 krónur.

Pílagrímar er 131 blaðsíður og kostar somuleiðis 220 krónur.




